ÍTRÓTTARBLAÐIÐ
Sosialurin 23. desember 2009

# Klassikari við broddi

**Einasta av seinnu hálvfinalunum í Coca-Cola steypakappingini, sum kann væntast at verða spennandi, er mansdysturin millum Kyndil og VÍF. Í hinum trimum hálvfinalunum er talan stórt sæð bara um avgreiðslu**




Hilmar Jan Hansen

At tað eru tey bæði mest vinnandi mansfeløgini, ið bresta saman í seinnu hálvfinaluni á Hálsi annan jóladag, skerst ikki burtur. Tær 64 ferðirnar, spælt hevur verið um føroyameistaraheitið í føroyskum manshondbólti, hava Kyndil og VÍF vunnið tilsamans 51 ferðir, umframt at tey eisini teljast millum mest vinnandi feløg í steypakappingini.

Í fyrru hálvfinaluni, sum var í Vestmanna leygardagin, vann Kyndil við fýra málum, 26-22, og tað var triði sigurin av trimum møguligum í uppgerðunum millum Kyndil og VÍF í ár. Men VÍF, sum byrjaði landskappingina illa, hevur ment seg í síðstuni, so talan er um ein púra opnan dyst.

Gamli klassikarin millum havnarmenn og vestmenningar er eisini tann einasti av teimum fýra hálvfinaludystunum annan jóladag, sum nakað av spenningi stendur um, tí allir hinir endaðu við so stórum og sannførandi stórsigrum, at sera óvæntað ting skulu henda, endar alt ikki, sum tað sá út um vikuskiftið.

## Eingin spenningur

Í hinari seinnu hálvfinaluni hjá monnum møtast H71 og Neistin í Hoyvíkshøllini, men har skal ganga óvanliga væl hjá H71 og óvanliga illa hjá Neistanum, skal nakað flytast. Neistin vann fyrru hálvfinaluna við 12 málum, 40-28, og hevur gott og væl annað beinið í steypafinaluni.

Tann sama er støðan í báðum seinnu hálvfinalunum hjá kvinnum, har Stjørnan vann við sensationellum 11 málum á Tjaldri í Runavík, 31-20, umframt at VÍF somuleiðis vann við 11 málum, 32-21, á Kyndli, ið er einasta liðið úr næstbestu deildini, sum er komið í hálvfinalurnar.

Stjørnan og Tjaldur eru klárt tey bæði bestu kvinnuliðini hetta kappingarárið, men tað er fullkomuliga óhugsandi, at Tjaldur skal megna at hála tey 11 málini innaftur ímóti formsterku Stjørnuni, sum eisini fyri hálvariaðru viku vann við fimm málum á Tjaldri í landskappingini. Og hóast Kyndil kanska hevur eitt betur mannað lið, enn í Vestmanna leygardagin, kann ikki hugsast, at tað skal bera til at venda øllum og vinna við 12 málum á VÍF annan jóladag.



Høgni Klein og hinir í Kyndli skulu annan jóladag forða VÍF í at koma afturíaftur í steypakappingini. Fyrru hálvfinaluna teirra millum vann Kyndil við fýra málum
Mynd: Álvur Haraldsen

## Dystir annan jóladag

**Coca-Cola kappingin, kvinnur**
**Seinnu hálvfinalur**
26/12 14.30 Kyndil-VÍF
26/12 16.00 Stjørnan-Tjaldur

**Coca-Cola kappingin, menn**
**Seinnu hálvfinalur**
26/12 16.00 Kyndil-VÍF
26/12 18.00 H71-Neistin

## Kringvarpið ítróttarsáttmála

**Eftir trý ár í sáttmálaloysi hevur Kringvarpið nú gjørt sáttmála við ÍSF um loyvi til at senda beinleiðis frá ítróttarhendingum**

Rættindini hava annars verið í ongamannalandi síðstu trý árini, tó at partarnir alla tíðina hava virkað eftir gamla sáttmálanum.

Nú nýggjur sáttmáli er gjørdur, er ikki nakað gjald fyri loyvi at senda longur við. Hinvegin hevur Kringvarpið bundið seg at senda ávísar ítróttahendingar, uttan at stovnurin tekur gjald fyri hetta.

Eftir gamla sáttmálanum rindaði Kringvarpið 300.000 krónur um árið, men hinvegin vóru dømi um eitt nú hondbólts- og flogbóltsfinalur, sum stovnurin ikki vildi senda beinleiðis, um partur av hesum ikki var goldin av avvarðandi sersambandi.

Av tí at nýggi sáttmálin ikki er gjørdur, fyrr enn árið mestsum er liðugt, skal Kringvarpið gjalda 300.000 krónur fyri tað, sum er sent í 2009.

-mørk

# Marta og Messi heimsins bestu

**Á gallaveitslu hjá FIFA í fyrrakvøldið vórðu Marta úr Brasil og Messi úr Argentina kosin heimsins besti fótbóltsspælarar í 2009. Og spælarar úr sponskum og enskum stórfeløgum manna besta samansetta mansliðið í 2009**




Jákup Mørk



Heimsins bestu fótbóltsspælarar, Marta úr Brasil og Messi úr Argentina, saman við FIFA-aðalskrivaranum, Joseph S. Blatter
Mynd: Fabrice Coffrini/AFP Photo

Tað eru landsliðsvenjarar og -liðskiparar, sum greiða atkvøðu hjá FIFA, og eins og hjá France Football herfyri, fall valið hjá monnunum á Lionel Messi. Aftur hesa ferð var hann framman fyri Cristiano Ronaldo, sum í fjør vann heiðurin. Hinir tríggir, sum vóru í uppskoti, vóru liðfelagarnir hjá Messi, Xavi og Iniesta, umframt Kaka, sum spælir í Real Madrid.

– Vit eru júst lidnir við eitt søguligt ár. Eitt fullkomið ár, har vit vunnu allar kappingar, sum vit tóku lut í. Okkum tørvaði at taka hetta síðsta stigið, og alt hevur bara gingið eftir vild, segði Messi, tá hann tók ímóti steypinum.

Hetta var fyrstu ferð, Messi fekk heiðurin, meðan tað hjá kvinnunum fjórða árið á rað gjørdist brasilski bóltsnillingurin, Marta, ið vann – og eingin hevur fingið heiðurin so ofta sum hon. Umframt hana vóru Birgit Prinz úr Týsklandi, Kelly Smith úr Onglandi, Cristiane úr Brasil og Inka Grings úr Týsklandi innstillaðar, men Marta næstan líka nógvar atkvøður sum tær fýra tilsamans.

– Hetta er ein heiður til einstaklingin, men uttan allar mínar liðfelagar kundi eg ikki framt nøkur einmansavrik og vunnið nakran heiður. Eg eri líka fegin um heiðurin hesa ferð, hóast tað er fjórðu ferð, og vónandi kann hetta skunda undir vøksturin í kvinnufótbóltinum, segði Marta.

## Spanskt/enskt heimslið

Partur av FIFA-hátíðarhaldinum í fyrrakvøldið var eisini setan av ársins liði. Tað eru limir í altjóða spælarasambandinum, FIFPro, sum greiða atkvøðu í hesum, og er úrslitið eftirfarandi, er eingin ivi um, hvørji bestu liðini í heiminum eru.

Umframt Barcelona, sum setti sín dám á liðið, komu spælararnir úr Manchester United, Chelsea, Liverpool og Real Madrid, so róliga kann staðfestast, at enska og spanska deildin eru sterkastu fótbóltdeildir í heiminum.

Liðið hjá FIFPro er mannað soleiðis: Iker Casillas (Real Madrid), John Terry (Chelsea), Nemanja Vidic (Man Utd), Patrice Evra (Man Utd), Daniel Alves (Barcelona), Xavi (Barcelona), Andres Iniesta (Barcelona), Steven Gerrard (Liverpool), Lionel Messi (Barcelona), Cristiano Ronaldo (Real Madrid), Fernando Torres (Liverpool).